# TAÐ ANDALIGA



*Seinastu 15 árini hevur Kjartan Stakksund skrivað ein hóp av sangum við andaligum innihaldi. - Summi løg eru lættari at skriva til enn onnur, sigur 80 ára gamli eiðismaðurin*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

✝

## Til minnis um

Dagin fyri at henda samrøðan varð gjørd – týsdagin 16. november 2010 - fekk Kjartan Stakksund íblástur til at skriva enn ein sang.

Hesin sangurin er skrivaður um jarðarferðir, og snýr seg um vónina, at møtast aftur heima í Himli.

Sangurin verður prentaður í heilum líki:

Lag: Góða mamma, eg vil sova

*Ein dag aftur skulu møta,*
*teim, ið vit her skiltust frá;*
*o, tað verður sæl ein løta,*
*altíð verða Gudi hjá.*

*Øll sum her við sorg enn standa,*
*við so manga opna grøv;*
*tey sum frelst har skulu landa,*
*hinumegin deyðans høv.*

*Ein er sum her hevur gingið,*
*deyðans myrka dapra veg;*
*ævigt lív tú hevur fingið,*
*blóð hans rann her fyri teg.*

*Trýrt tú á tað frelsuverkið,*
*fyri teg á Golgata;*
*og at Jesus er hin sterki,*
*reis úr grøv. Halleluja.*

*Tað er blóðið, eina blóðið,*
*sum kann frelsa enn í dag;*
*hoyrir tú tað sæla ljóðið,*
*gerst tær sálin fró og glað.*

*Hevur tú her Jesus funnið,*
*eigur tú her sælan frið;*
*tí hans blóð, tað hevur runnið,*
*tú ert nú í frelsta lið.*